# Vørubilur á sjógv í Nólsoy



Hesin vørubilurin hjá RTS fór út av bryggjukantinum í Nólsoy herfyri

Mynd: Bjarni

**Eingin mansskaði hendi, tá ið ein vørubilur herfyri fór á sjógv í Nólsoy**

ÓHAPP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er tíbetur ikki vanligt, at ferðsluóhapp henda á útoyggjunum kring landið. Bilarnir eru fáir, og vegirnir smáir. Vanligastu akførini eru traktorar, og er handilsmaður í bygdini, hevur hann kanska ein lítlan vøruvogn til flutning niðan av bryggjuni – og omanaftur við tómum fløskum.

Í Nólsoy eru tveir matvøruhandlar og kaffistova. Tí verður nakað av koyring aftur og fram, tá ið fraktdagur er við Rytuni.

Arbeitt hevur eisini verið við at bøta um og útbyggja havnalagið. Grótarmurin vestureftir er longdur, og nú verður nýggjur grótarmur lagdur út úr Kirkjutanganum.

Tað er RTS, Runavíkar Transportservice, sum stendur fyri hesum arbeiði, og meðan arbeitt hevur verið, hava tungir bilar koyrt oman úr Skálanum við gróti.

### Bilur á sjógv

Ein dagin herfyri fór ein vøruvognur hjá RTS á sjógvin, men tíbetur stóðst eingin fólkaskaði av óhappinum.

Sum skilst, var hetta eitt hendiligt óhapp, har bilførarin helst hevði gloymt at hálað í hondbremsuna, áðrenn farið varð út úr bilinum.

Vørubilurin fór út av bryggjukantinum beint frammanfyri bátin hjá Høgna Niclasen.

Sum skilst, eydnaðist tað RTS at fáa bilin uppaftur í øllum góðum.




Vinnuhúsið søkir samskipara

## Fá vinnuna at spíra

**Vinnan hevur brúk fyri fólki við visjónum. Í hesum anda søkir Vinnuhúsið eftir samskipara at arbeiða við vinnumálum.**

Hevur tú sjónir um, hvussu vit menna møguleikarnar hjá vinnuni? Vilt tú vera við til at fáa verandi vinnur framá og fáa nýggjar spírar at næla? Og megnar tú bæði at arbeiða breitt og fara í dýpdina? So er tað tær, vit sóknast eftir.

Arbeiðsøkið hjá vinnusamskiparanum fevnir um vinnuviðurskifti í breiðum týdningi. Tú kemur at luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, ið viðgera karmar og viðurskifti hjá vinnuni. Mál skulu lýsast, og tú skalt framleiða kanningar og frágreiðingar. Lógir og kunngerðir, ið ávirka vinnuna, skulu leggjast undir luppin, og tú verður við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum. Harafturat skalt tú røkja málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnugreinafeløgunum.

Alt hetta krevur eitt ávíst samskifti við myndugleikarnar og serliga eitt tætt samstarv við vinnuna í Føroyum.

Vit vænta, at tú hevur hægri útbúgving, arbeiðsroyndir og fingurin á føroyska vinnupulsinum. Tú hevur góð samstarvsevni og arbeiðir bæði miðvíst og sjálvstøðugt. Tú orðar teg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

Hevur tú hesar eginleikar bjóða vit tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi, har tú verður løntur eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn við frámerkinum "starv" skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. februar 2005.
Vilt tú vita meira, kanst tú ringja til stjóran, Jan Mortensen, á telefon 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038
FO-110 Tórshavn

Vinnuhúsið er felags skrivstova hjá 12 vinnufeløgum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Tað verður gjørt við miðvísum arbeiði og kunning, ið kann geva politiska ávirkan. Feløgini veita limunum ráðgeving, taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum. Seks fólk starvast í Vinnuhúsinum.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Smærugøtu 9a, FO-100 Tórshavn, Tel 30 99 00, Fax 30 99 01, industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo


# Evangelisk fundarøð í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV

Undir heitinum "Kristus frelsir til fulnar" verður ein evangelisk fundarøð í Siloa í Fuglafirði frá mikudegnum 9. til sunnudagin 13. febr. Tað er Svenning av Lofti, sum fer at hava hesa fundarøðina, og í tí sambandi er innbjóðing borin í hvørt hús í Fuglafirði. Í innbjóðingini hevur Svenning eina persónliga heilsan til fuglfirðingar, har hann m.a. sigur:

"Tá ið eg vaks upp norðuri á Eiði í 1940-50-unum, var eg nógv áhugaður í fótbólti. Tað var ein serstakur hátíðarfarri yvir bygdini, tá ið fuglfirðingar komu at spæla móti EB. Sum 14 ára gamal varð eg biðin um at vera málmaður hjá eiðismonnum, tí teir skuldu til Fuglafjarðar at spæla fótbólt. Men mamma helt meg vera ov ungan - so eg fór ongan veg ta ferðina - men havi verið ofta síðani.

Og nú eri eg aftur! Hesuferð við einum boðskapi, ið ikki einans hevur týdning fyri hetta lívið, men eisini fyri ævinleikan. Ítrótturin er nyttuligur fyri hetta lívið, men Bíblian sigur, at "gudsóttin er nyttuligur til alt og hevur lyfti, bæði fyri hetta lívið og fyri hitt, ið kemur."

Eg eri útbúgvin prentari. Men síðani eg var 32 ára gamal havi eg burturav virkað sum evangelistur og prædikað gleðiboðini um Jesus Kristus. Serstaka væl hóvar mær at hava slíkar fundarøðir, sum hesa í Fuglafirði 9-13 februar, har eg fleiri kvøld á rað kann bera fram boðskapin um Jesus og kunna leiða menniskju til hann, ið eina kann frelsa."

Fyrsta møtið verður, sum sagt, mikukvøldið kl. 19.30, har Svenning fer at tala um evnið: "Tín leiklutur í verki Guds er sera týdningarmikil". Síðani verða møtini hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18.

Á fundunum fara ymiskar sangkreftir at luttaka, m.a. Kvinnukór av Toftum, Finnur Hansen v/familju, Sangbólkurin Salt og sangkórið í Siloa.

Barnamøtir verða eisini - mikudag til leygardag kl. 17. Har verður nógvur sangur, søgur o.a.

Í innbjóðingini, sum er borin í húsini, heilsar Svenning fuglfirðingum at enda soleiðis: "Tað er mær ein framíhjárættur at bjóða tær hjartaliga vælkomnum til hesi møti og tað hevði glett meg nógv at síggja teg!"